**Absalon Áargarð við í leiðsluna í Lívdini**

Paulus sigur í 1 Tim. 3:1 soleiðis, *"Tað er trúvert orð, at tráar onkur eftir umsjónarembæti, er tað gott verk, hann hevur hug til."*

Frá tí at Lívdin byrjaði í 2001 hava vit havt eina sjónliga leiðslu í samkomuni. Vit byrjaðu sum fýra – Jákup Jacobsen, Jens Wang, Absalon Áargarð og Jógvan Zachariassen. Síðani tá eru nakrir farnir og aðrir kominr í leiðsluna.

Vit hava biðið nógv seinastu mánaðirnar um at leiðslan skal styrkjast og vit hava havt eyguni opin eftir kandidatum í leiðsluna. Tað er ikki ofta í eini samkomusøgu at hetta versið í 1 Tim 3:1 kemur í uppfylling. Men vit kunnu við gleði boða samkomuni frá at Absalon Áargarð, sum fór úr leiðsluni fyri trimum áðrum síðani, nú kennir Harrans kall at koma aftur í leiðsluna.

Tað er ikki tað at Absalon kemur aftur í leiðsluna eftir "orlov." Nei, hann kemur av nýggjum inn í leiðsluna. Hetta eru vit í leiðsluni ómetaliga glaðir fyri, og vit halda tí, at hetta kann best staðfestast við, at samkoman eisini fær høvi at siga sína hugsan um Absalon og at mótmæla, um eitthvørt álvarsamt skuldi verið, ið ger, at hann ikki er egnaður at vera elsti.

Samkomuni verður tí givið høvi næstu 10 dagarnar at siga frá, um so skuldi verið. Tað verður ikki hugsa um nakað smávegis, men um álvarsmál (t.d. eina vanasynd), ið gera, at viðkomandi ikki livir upp til førleikakrøvini í Bíbliuni.

Hevur tú eitthvørt at siga í so máta, verður tú biðin um ein av fyrstu døgunum at venda tær til Jens Wang og siga honum (skrivliga) frá.

Hetta má fylgja einari bíbilskari tilgongd:
Fyrst skal tú koma til leiðsluna við tveimum ella trimum vitnum, sum kunnu vitna, at tað, tú sigur, er rætt (1. Tim. 5:19-20). Leiðslan skal so saman við tær biðja fyri spurninginum og meta um, hvussu álvarsamt málið er. Um leiðslan er samd við tær í, at málið er álvarsamt, skulu teir saman við tær seta seg í samband við viðkomandi fyri at tosa um málið. Teir eru samstundis vitnir um tað, sum verður sagt (sí Matt. 18:15).

Um alt er í lagi, og eingin klaga kemur móti honum, so innseta vit Absalon Áargarð sum part av leiðsluni í Lívdini sunnudagin tann 21. novembur 2010 á tilbiðjanarløtuni klokkan 11:00.

Vinarliga

Leiðslan í Lívdini